# ta Føroyar á heimskortið



*Í dag varð avdúkað á fundi í Vinnuhúsinum í Havn, at Bill Clinton og Hans Blix skulu halda fyrilestur í Føroyum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

### Bill Clinton



William Jefferson Clinton, betur kendur sum Bill Clinton, er føddur 19. august í 1946. Hann gjørdist amerikanskur forseti í 1993 og fór frá í 2001, tá hann ikki kundi stilla uppaftur. Bill Clinton er demokratur og var 42. forsetin í røðini.

Áðrenn Bill Clinton gjørdist forseti var hann fimm ferðir valdur sum guvernørur í statinum Arkansas, tilsamans í nærum 12 ár.
Sum forseti virkaði Bill Clinton fyri betri útbúgving, størri eftirliti við søluni av hondvápnum og strangari umhvørvislóggávu. Á altjóða politiska pallinum meklaði Clinton millum partarnar í Ísrael-Palestinakonfliktini og í Norðurírlandi. Av øðrum ítøkiligum uttanríkispolitiskum avrikum er Dayton-avtalan, sum var endin á borgarakrígnum í Bosnia.

Saman við konu síni, Hillary Rodham Clinton, var hann undir illgruna og kannaður í samband við Whitewater-málið. Bæði vórðu tey fríkend, men málið førdi til avdúkingina av einum øðrum máli, nevniliga Lewinsky-gøluna, har tað kom fram, at Bill Clinton hevði havt kynsligt samband við Monicu Lewinsky, sum starvaðist í Hvítu húsunum.

Annars er Bill Clinton bachelor í uttanríkistænastum frá 1968. Eftir tað las hann stjórnmálafrøði á Oxford. Síðani byrjaði Bill Clinton á Yale Law School, har hann í 1973 fekk prógv sum Juris Doctor, sum er nakað tað sama sum doktari í løgfrøði.
Tað var eisini á Yale, at Bill Clinton møtti Hillary Rodham, sum í 1975 gjørdist Hillary Rodham Clinton. Tað bæði eiga dóttrina Chelsea Clinton, og hana fingu tey í 1980.

*kelda: www.wikipedia.org*

## FAKTA

### Hans Blix



Hans Blix er føddur í 28. juni 1928 í Uppsala í Svøriki. Hans Blix hevur lisið á Uppsala University, Columbia University og á University of Cambridge, hagani hann er doktari í løgfrøði.

Eftir drúgvar royndir í svensku uttanríkistænastuni, var Hans Blix uttanríkisráðharri frá 1978 til 1979, og frá 1981 til 1997 var hann aðalstjóri í Altjóða Kjarorkunevndini, International Atomic Energy Agency.

Í 2000 valdi Kofi Annan Hans Blix sum leiðara fyri vápnainspektørarnar hjá ST, og tað var undir leiðslu Hans Blix, at leitanin eftir hópoyðingarvápnum í Irak byrjaði.
Nú er Hans Blix leiðari av nýstovnaðu altjóða nevndini fyri hópoyðingarvápn, sum hevur sítt høvuðssæti í Stokholm.

living, sigur Jóhan Páll Joensen.

Hvat evni verður á fundinum, er ikki greitt enn, men Magni Arge, nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarfelag, sigur, at Clinton plagar at tosa um teir "stóru spurningarnar", tvs. heimspolitikk o.l. evni.

Fyrireikararnir himprast heldur ikki at viðganga, at tað er kalendarin hjá Clinton, ið hevur avgjørt, at tað júst verður 24. mai, sum verður dagurin, tá Clinton vitjar í Føroyum. Sambært Magna Arge er hetta tó heppið, tí hetta er tíðin, tá tað sambært hagtølunum eru minst sannlíknindi fyri, at fløgfør ikki fáa lent vegna mjørka.

Spurdir, um Clinton kennir Føroyar, svara fyrireikararnir, at hann í øllum førum hevur flogið yvir Føroyum áður, og at hann í øllum førum veit um Føroyar, nú oyggjalandið hevur fingið innivist í hansara álmanakka.

Tað er kortini púra vist, at Clinton fær nógv tilboð, og at hann kann velja og vraka millum tilboðini. Harafturat fer hann at seta nógva tíð næstu mánaðirnar av til valdystin hjá konuni Hillary Clinton um at gerast næsti forsetin í USA.

Føroya Arbeiðarafelag hevur arbeitt við at fáa Clinton til Føroya síðan í heyst, og fyrireikararnir siga, at nærri verður at frætta seinni, hvussu tann endaliga skráin fer at síggja út.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

---

eldisfloksins:

## randing

- Tað sigur seg sjálvt, at vit eiga at brúka vitjanina til at marknaðarføra Føroyar, og tí eiga vit eisini at skipa fyri fleiri uttanum tiltøkum í sambandi við vitjanina. Tiltøk um evni, sum vit ynskja meira fokus á, sigur Høgni Hoydal. Hann vónar, at altjóða fjølmiðlar fara at koma við hendan vegin, so teir kunnu vera við til at varpa ljós á Føroyar.

- Myndir av honum í ávísum samanhangi hava ómetaliga nógv at siga, og kunnu verða nýttar til at seta fokus á nærum hvat sum helst, sum vit meta hevur tørv tí. So setið hann saman við skúlabørnum ella takið eina mynd av honum uppi á Slættaratindi, skoðandi yvir oyggjarnar, sigur Høgni Hoydal, eitt sindur skemtandi, men tó í álvara.

---

Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum:

## Clinton er vælkomin at sova hjá okkum

- Ein tílík vitjan gevur eina stóra profilering av Føroyum í ferðavinnuhøpi, sigur stjórin á Hotel Føroyum, Johannes Jensen.

Hann vísir á onnur dømi, tá kend tónleikanøvn og landslið koma henda vegin. Við í ferðahópinum eru ofta fleiri útlendsk tíðindafólk, sum gera innsløg og samrøður úr Føroyum.

- Sjálvandi er torført at seta krónur og oyra á virði á tílíkari profilering, men hon hevur uttan iva stórt virði.

Johannes Jensen vísir annars á eitt ítøkiligt dømi, tá Bill Clinton á síni vitjan í Keypmannahavn fyri nøkrum árum síðani vitjaði Barresso-kaffistovuni at fáa sær ein heitan munn.

- Kaffimunnurin í Barresso hevði eitt øgiligt lýsingarvirði, sigur Johannes Jensen, ið ikki dylur yvir, at ein forsetavitjan á Hotel Føroyum hevði verið kærkomin.

- Vit hava eina løgmanssuitu, sum er. Men forsetar er eisini vælkomnir at sova har í nakrar nætur, leggur stjórin skemtiliga fyri.

---

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur:

## Trygdin verður í hásætinum

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur við Sosialin, at løgreglan fekk fyrispurning um vitjanina fyri einum mánað síðani ella so.

- Fyri okkum er hetta bara ein uppgáva, og vit fara at gera alt til, at trygdin verður í hásæti. So hóast uppgávan bæði er avbjóðandi og spennandi, so mugu vit onki siga um, hvussu trygdin fer at vera skipað, sigur Jón Klein Olsen. Hann dugur tó ikki at ímynda sær, at alvápnaðir hermenn ella politistar fara at standa kring landið.

- Vit hava ávísar manna-



gongdir, sum vit halda okkum til í sambandi við tílíkar vitjanir. Vit hava fleiri ferðir vart eitt nú drotningina, heimskend fótbóltslið og framstandandi politikarar, so hetta er ikki heilt óvanligt í okkara verð, sigur hann.

Spurdur, hvussu vanligi føroyingurin fer at kenna á sær, at trygdin skal vera í topp, sigur hann seg rokna við, at tað kanska verður okkurt, sum fólk ikki sleppa, umfram at ferðslan helst fer at vera tarnað nakað hendan dagin.

- Vit skulu ikki forða honum, men verja hann, sigur Jón Klein Olsen, at enda.